# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Eftir okkara tykki eigur ein amerikanari at loysa Paul Wolfowitz av í Heimsbankanum*

*(George W. Bush, forseti)*

# – Vit fara at berjast til síðsta blóðdropa



**Libanon kann aftur enda í einum eldi. Teir vápnaðu islamistarnir ætla sær ikki at slaka**

– Tað var stjórnarherurin, sum byrjaði bardagarnar, og tí er tað eisini herurin, sum skal gevast fyrst, segði talsmaðurin hjá islamistiska felagsskapinum Fatah al-Islam í morgun, og hann gjørdi greitt, at islamistarnir eru til reiðar at verja seg.

– Heldur herurin fram við sínum álopum, eru vit til reiðar at stríðast til tann seinasta blóðdropan, segði Abu Salim Taha við fronsku tíðindastovuna AFP.

Bardagarnir hildu fram í morgun, tá stjórnarhermenn hildu á at skjóta eftir støðum, sum Fatah al-Islam hevur í einari palestinskari flóttafólkalegu norðan fyri býin Tripoli. Í gjárkvøldið heittu hjálparfelagsskapir á teir stríðandi partarnar um at steðga skjótingini, tí deyð og særd fólk liggja og sløðast í gøtunum í flóttafólkaleguni.

Bardagarnir eru teir harðastu í Libanon, síðani tað 15 ára langa borgarakríggið endaði í 1990. Dagurin er í dag er tann triði við hørðum bardøgum. Teir báðar fyrstu dagarnar doyðu 20 islamistar, 32 stjórnarhermenn og 27 sivilfólk.

### Verri enn

Norðmaðurin Geir O. Pedersen, sum er serligur ST-sendimaður í Libanon, sigur við norskar fjølmiðlar, at hann stúrir fyri, at bardagarnir fara at versna, og at teir eisini fara at breiða seg.

ST-sendimaðurin sigur tað ikki vera óhugsandi, at libanski stjórnarherurin fer at leggja gamlar avtalur til viks og at senda hermenn inn í palestinsku flóttafólkaleguna fyri at berja Fatah al-Islam niður, tí hvørki teir palestinsku myndugleikarnir ella palestinskir felagsskapir í Libanon høvdu sett seg upp ímóti tí, sigur hann við NTB.

# Carter tekur viðmerking aftur



*Jimmy Carter: – Eg var ikki nóg varin*

**Fyrrverandi forsetin iðrar seg um, at hann hevur sagt stjórnina hjá Bush vera ta ringastu í søguni0**

– Eg var kanska ikki nóg varin, tá eg segði tað, sigur Jimmy Carter.

Tað var á einum fundi leygardagin, at hann lýsti verandi stjórnina í Washington sum ta ringastu í amerikonsku søguni. Men orðini vóru ikki soleiðis meint, sigur hann nú. Hann meinti, at stjórnin hjá Bush er tann ringasta, sum USA hevur havt síðani stjórnina hjá Richard Nixon.

Bretski forsætisráðharrin, Tony Blair, fekk eisini ákoyringar frá Carter leygardagin. Við BBC segði fyrrverandi forsetin, at tað var ein sorgarleikur fyri heimin, at Blair styðjaði Bush í álopinum á Irak.

## STUTT SAGT

### Fáa svar í september

Í september fæst at síggja, um tað fekk ta ætlaðu ávirkanina, tá George W. Bush, forseti, gjørdi av at senda 28.000 hermenn afturat til Irak fyri at bøta um trygdina í høvuðsstaðnum Bagdad. Sambært forsetanum hevur ovastin fyri amerikonsku deildunum í Irak, generalurin David Petraeus, sagt, at september fer at vísa, hvat er komið burturúr. Sjálvur sigur forsetin seg vera bjartskygdan. Hann er annars undir sera hørðum trýsti, tí tann demokratiski meirilutin í Kongressini krevur, at onkur úrslit síggjast aftur í Irak, skrivar AP.

### Illir kinesarar

Í gjár vóru stórar kravgongur í kinesiska landspartinum Guangxi í útsynningspartinum av landinum. Millum annað bleiv eldur settur á eina almenna skrivstovu. Fólk kravdu, at myndugleikarnir skulu broyta lógina, sum sigur, at hjún kunnu bara hava eitt barn. Lógin bleiv sett í gildi í 1980 fyri at tálma tí skjótt veksandi og ovurstóra fólkatalinum. Í seinastuni hava myndugleikarnir hert eftirlitið við, at lógin verður hildin, og tað er helst hetta, sum nú fær fólk út á gøturnar at mótmæla lógini, skrivar Reuters.

### Lækni hjálpti al-Qaeda

Ein 52 ára gamal amerikanskur lækni kann fáa 30 ára fongsul, eftir at hann er dømdur sekur í at hava havt ætlanir um at fáa sær arbeiði á einum sjúkrahúsi í Saudiarabia, har hann skuldi hjálpa særdum limum í felagsskapinum al-Qaeda. Aftan á viðgerðina skuldu menninir fara til Irak at berjast. Tað eydnaðist einum manni hjá FBI at avdúka ætlanina, og nú kann læknin fáa upp í 30 ára fongsul. Fleiri fólk, sum standa honum nær, kunnu eisini enda í fongsli.